*Ársins songrødd:*

# Finalan verður í annaðkvøld

**Fjølbroytt skrá, tá vinnarin í kappingini um ársins songrødd verður kosin í annaðkvøld**

Í annaðkvøld kl. 23.00 verður vinnarin í kappingini »Ársins songrødd '96« funnin.

Finalistarnir fara at kappast í seks umførum, áðrenn dómararnir taka endaligu avgerðina.

Men hetta er ikki tað einasta, sum verður á skránni.

Gitte Wigan, sum vann kappingina í fjør, er í ferð við at gera eina fløgu, og fyra løg av teimum nýggju løgunum verða at hoyra í annaðkvøld.

Dansur verður sjálvsagt eisini, og Gardar og Páll fara at syrgja fyri, at tónleikurin koyrir sum hann skal.

**King Lion**

Umframt hetta verður amerikanarin King Lion eisini at hoyra. Har var í nógv ár tónleikari í USA, har hann spældi bæði blues, punk og rock - men í 1988 flutti hann til Svøríkis.

King Lion hevur havt fleiri hit í Skandinavia, og umframt at vera góður tónleikari, sigst hann eisini vera sera góður at undirhalda, tá hann er á palli.

Hurðarnar í Gundadals høllini verða sum sagt latnar upp kl. 23.00, og hildið verður á út á náttina.

-s-s-



*King Lion, sum eisini fer at spæla í annaðkvøld*

SKÍHANDSKAR
* Gott gávuhugskot *
Teir nógv eftirspurdu skíhandskarnir eru nú afturkomnir í øllum std. 4–14 ár.
Ymiskir saman-settir litir
EINANS KR. 49,-
DADDAN
í miðbýnum
L. DEBESARGØTA 6
Tlf. 12138

## Føroyskir bogaskjúttar til Randers

Triggir bogaskjúttar – Páll Hansen, Absalon Hansen og Schandorff Vang – úr feløgunum Tambar og Ørvi fara til Randers í Danmark at luttaka í stórari kapping leygardagin 3. des.

Henda kapping er hjá døum eina av teimum úttøkukappingum til EM og VM, og hava vit valt júst hesa kapping fyri at møta teimum bestu skjúttunum í Danmark. Hetta tí vit vilja hava størri avbjóðingar og meiri vitan um, hvussu hesir skjúttar venja og bera seg fram í størri kappinguni, og vónandi fer tað at geva okkum størri inspiration og motivation at arbeiða víðari við okkara egnu venjing, tá vit koma heim aftur.

Orsøkin til at vit velja aðrar kappingar enn Oyggjaleikir at fara til, er tí at vit halda tað vera ov leingi at sita og bíða í tvey ár, áðrenn vit aftur skulu fáa størri avbjóðingar.

Hetta krevur sjálvandi fíggjarligan stuðul, tí feløgini eru ikki sera sterk á hesum øki. Vit hava verið sera hepnir at fingið góðan stuðul frá Føroya Sparikassa, Faroedane, Petersen og Guttesen og Føroya Shell, og teimum vilja vit bera stóra tøkk.

*Dómur um Lopraboring klokkan 14 føroyska tíð:*

# Shell er við - Mærsk hevur ongan áhuga



Í dag klokkan 14 fellur "dómur" í spennandi Lopraboringar-málinum. Tá skulu oljufeløg kring alt Europa og USA hava svarað danska projekteringsfelagnum Danop, um tey vilja vera við at fíggja enn eina boring í Lopra.

-Eg eri framvegis bjartskygdur segði ein spentur Arne Rosenkrands Larsen, stjóri í Dopas, tá vit høvdu samband við hann seinnapartin í gjár.

Hann sigur, at nú hava teir fingið 2/3 av neyðugu feløgunum við. Tvs. at eini 10 til 12 feløg hava boðað frá, at tey vilja vera við í Lopraboringini næsta ár.

Við øðrum orðum resta bert eini 2-3 feløg í til at kunna fara í gongd.

Sosialurin hevur tosað við umboð fyri nøkur av feløgunum. Stjórin á Shell, Hjarnar Djurhuus vil ikki siga tað beinleiðis, sum sum hann málber seg, tá vit spyrja, um Shell verður við: "Nakað bendir á tað".

So vit mugu rokna við Shell í komandi Lopraboringini.

Hjá Mærsk Olie og Gas eru teir enn meira kontantir. Har er einasta viðmerkingin hjá varastjóranum Bent Wildfang: "Vit eru ikki við í Lopra".

Tá vit spurdu hann um hetta merkir, at Mærsk als ongan áhuga hevur fyri føroyska økinum og eini møguligari komandi oljuvinnu her, sigur hann seg onga viðmerking at hava.

jan

TECHNIC DEKK
Allar vanligar støddir
DEKKSØLAN Á SELATRAÐ
Tlf. 48 195
Vit skifta eisini dekk um kvøldið og í vikuskiftinum